# námsverkætlan í Grønlandi



*Risaskip lastar 55.000 tons av olivini frá námsbygdini* *Myndir Árni Jakobsen*



Marknaðarrák

## Oljan hækkað aftur

Oljuprísurin er hækkaður rættiliga nógv farnu vikuna, úr 66 í 71 dollarar fyri tunnuna. Summarið er háárstíð fyri bilferðslu í USA, og tørvurin á bensini er stórur. Samstundis vænta íleggjarar, at lítið av bensini er á goymslu. Flestu aðrir marknaðir hava verið friðarligir hesa farnu vikuna, mest tí, at fá áhugaverd tíðindi eru kunngjørd. Nú nærkast summarfrítíðin hjá teimum flestu, og hetta plagar vanliga eisini at merkja marknaðirnar. Einstøk gjaldoyru í sonevndum emerging markets hava rørt seg eitt sindur. Hetta eru lond sum til dømis Turkaland, Brasil og Kina.

Lánsbrævarentur støðugar Lánsbrævarenturnar eru hækkaðar hesa farnu vikuna. 10-ára danska rentan er soleiðis hækkað 0,10% í 4,10%. Hetta hevur havt eitt sindur av kurstapi við sær. Í næstantríggjar mánaðir hava lánsbrævarenturnar flutt seg lítið. 10-ára rentan hevur ligið millum 3,90%-4,10%.

A. P. Møller – Maersk støðufastari A.P. Møller – Maersk (APM) partabrøvini eru lækkað um 18% í ár, m.a. orsakað av lækkandi fraktratum og øktum skipaútboði. Nú eru tó útlit fyri, at hesi eru vorðin støðufastari. Í ár eru fleiri fraktratur aftur hækkaðar enn lækkaðar, onkrar um 15% seinasta mánaðan. Tí eru útlit fyri at kursurin á APM nú fer at vera støðufastari. Verandi kursur 47.500 bendir á ein vøkstur hjá APM á einans 3%, hetta er alt ov dapurskygt. Saman við øðrum bjørtum grundleggjandi viðurskiftum, eru tí útlit fyri, at APM partabrøvini fara at standa seg lutfalsliga væl framyvir.

### Hesa vikuna

Hendan vikan verður hendingarík á virðisbrævamarknaðunum. Størstur er spenningurin um rentufundin hjá amerikanska tjóðbankanum. Flest øll vænta, at tey hækka rentuna 0,25% í 5,25%. Tað er hvat verður sagt í tí tilhoyrandi tíðindaskrivinum, ið marknaðirnir fara at hefta seg við. Um tað koma ábendingar um, at tað ikki koma fleiri rentuhækkingar í bræði, fer hetta at stuðla undir partabrævagongdini.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 592,57 | 0,0% |
| JPY | 5,10 | -0,7% |
| GBP | 1.080,58 | -1,0% |
| NOK | 94,11 | -0,8% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,31 | -0,3% |
| Norrøn Partabrøv | 106,50 | 2,5% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*